# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Røktar ikki landsins ogn

Tað er skelkandi at síggja poitiska leikin, nú aðalfundurin hjá tjóðarflogfelag okkara stendur fyri framman.

Partabrævahandilin í fjør summar var kanska á markinum. Men hesin snýr seg altso bert um 239.000 krónur í møguligum yvirkursi, og tí legitimiterar hetta á ongan hátt tey stig, sum nú verða tikin. Stig, sum gera stóran skaða á eina fyritøku, sum árliga skapar eitt útflutningsvirði fyri á leið kvarta milliard krónur. Samstundis var talan um eitt mál, har nevndin hevur gjørt tað, sum varð mett skilabest fyri felagið at gera undir givnu umstøðunum, og sæð í tí ljósinum varð hetta helst tað, sum var best fyri partaeigararnar. Tað vildi eisini verið løgið, um størsti privati partaeigarin hevði ætlað sær nakað, sum fór at skaða virðið á partabrøvum hansara.

Tí er tað skelkandi, at vinnumálaráðharrin nú skapar enn meira rumbul um eina fyritøku, sum er skrásett á virðisbrævamarknaðinum, og sum tí er sera viðkvom mótvegis rumbli og orrustum av slíkum slag. Og enn meira skelkandi er tað, at hesi stig – Fólkaflokkurin undantakið – fáa uppbakning í politisku skipanini.

Einki er statiskt, og tí vildi tað helst givið meining, um nevndarumboðini vórðu skift líðandi út við jøvnum millumbilum. Men at broyta reglurnar fyri nevndarvali, soleiðis at privatu íleggjararnir missa sína ávirkan, samstundis sum øll nevndin annars verður endavend, er ein serstakliga drastisk yvirreaktión. Ein reaktión, sum nærum bert sæst á marknaðinum, tá okkurt er logandi galið við leiðsluni í einum felag, og tað er hetta signal, sum vinnumálaráðharrin tykist vera til reiðar at senda á marknaðin – enntá saman við eini púrasta ógrundaðari útsøgn um, at flogfelagið hevur ella fær tørv á nýggjum kapitali. Og samstundis geva umheiminum boð um, at politiskar semjur innan virkiskarmar hjá vinnuni ikki eru tað pappír verdar, sum tær eru skrivaðar á. Í øllum er talan í hesum førinum greitt, at landið í fyrsta umfari hevur lokkað milliónaupphæddir frá íleggjarum, og nú kortini ikki vil fylgja teimum lyftum, sum fylgdu við fyrsta triðinginum av einskiljingini.

Uttan at taka nakað frá teimum, sum ætlanin er at velja inn í nevndina, er hetta eisini at veittra farvæl til eina rúgvu av know-how, sum er uppbygt gjøgnum árini. Og hetta er neyvan heldur at gagni hjá felagnum sjálvum ella partabrævakursinum.

Hvørji motivini enn eru fyri einum somikið ógvusligum inntrivi, so tykjast tey í øllum førum ikki at sampakka við endamálið um, at vinnumálaráðharrin skal umsita landsins ognir á skilabesta hátt.

**Sosialurin**

**Frælsisavtøkan hjá Sjálvstýri:**

## Fullkomið Sjálvstýris flopp!!!

**ÁRNI ANDREASEN**
koyrilærari



Tað er heilt ófatiligt, at Sjálvstýrisflokkurin skal leggja uppskot fram á ting um at avtaka virkandi koyriskúlar runt um í landinum. Kvinnur og menn sum hava verið uttanlands og goldið í túsundavís av krónum úr sínum egna lumma og lántøku fyri at vinna sær útbúgving sum koyrilærara, fyri síðani at koma heim at byrja sítt egna virki, nú við einum »skandaluuppskoti« frá Sjálvstýrisflokkinum bara skulu likviderast. Tað besta úrslitið við øllum virksemi fæst við totalt fríari kapping, og soleiðis er eisini við ferðslulæru.

Tann dagin tað almenna fer inn at drepa koyriskúlarnar, tá verður líkasælan viðv. undirvísing fullkomin, tað er onki sum helst ivamál um tað. Í dag er fríð kapping ímillum koyriskúlarnar og harvið dygdin í hásætið, og tað er bert at fegnast um, tí at næmingurin fer har, hann fær tað bestu frálæruna. Hettar veit eg, tí at eg spyrji javnan ungdómin um hesi viðurskifið.

**NULL-hugsjón**
Tá Sjálvstýrisflokkurin nevnir NULL-hugsjón, so haldi eg at tit fyrst skuldu tikið um trupulleikan sum kann loysast her og nú. Tað er at tit fáa donsku §88 ínn í føroysku ferðslulógina sum skjótast!!!

(§ 88 kann lesast her á heimasíðuni undir "ymiskt")

**Fyrst virkisrækstur, síðani ferðslulæra???**
Tit nevna, at koyrilærarar hugsa heldur um virkisrækstur enn ferðslufrálæru?? Eru tit svakir í heysinum??? Hvussu kann eg sum koyrilærari hugsa soleiðis og samstundis stremba eftir besta úrsliti? Tað er fullkomiliga ógjørligt. Eg havi eitt tað besta úrslitið í Føroyum, og virkisrækstur hevur aldrin verið í mínum tonkum. Eitt kann eg vissa tykkum í Sjálvstýri um, at tað er ikki ein tann einasti koyrilærari í Føroyum sum hugsar í hasar »banar« sum tit tosað um.

**Dagsins frálæruskipan**
Frálæruskipanin sum virkar á økinum í dag, er sera greið og væl úr hondum greidd (sera stóra tøkk til Akstovuna fyri hettar arbeiðið). Hendan lesiætlan sum arbeitt verður eftir, sigur greitt, hvussu nógvir tímar skulu fremjast í ástøði, og hvussu nógvir tímar í minsta lagi skulu frálærast í koyrifrálæru. Her hava allir koyrilærarar í Føroyum ein greiðan leist at virka eftir og sostatt fáa allir føroyingar sama møguleika til frálæru og at ognað sær eitt koyrikort.

At verandi frálæruskipan er sera ymisk, er ein fullkomin lodrøtt lygn. At so onkur næmingur hevur brúk fyri onkrum koyritíma eyka er ein »erlig« sak. Hattar kunnu vit ikki verja okkum ímóti tá vit hava við menniskju at gerða. So verður eisini nevnt at ósemja er ímillum koyrilærarar. Her mugu tit koma við beinraktum dømum, tí eg kenni meg ákærdan fyri hendan pástand hóast eg ikki kann síggja nakað dømi.

Fakligt "prikarí" kemur dagliga uppa at venda, men hvat, hettar gerð jú bara dagin enn livandi, tó alt í skemti.

Tá tað verður nevnt, at næmingar taka bara tað neyðugu frálæruna fyri at klára royndina, so er tað rætt, annars klárar tú ikki royndina. So einfalt er tað. Men eitt skal eg vissa tykkum í Sjálvstýri um, at tann neyðuga frálæran í lesiætlanini er yvaleysa nokk til at fáa fyrstafloks føroyskar bilførar út á vegirnar. Tað er hóast alt dygdargóðir próvdómarar á Akstovuni sum í síðsta enda venda tummulin niður ella upp um næmingurin er búgvin at fara út á vegirnar at koyra.

At enda vil eg inniliga heita á Tjóveldi, Fólkaflokkin, Sambandsflokkin, Javnarflokkin og Miðflokkin, um ikki at taka undir við Sjálvstýrisflokkinum, at vit sum hava okkara koyriskúlar ikki verða likvideraðir men fáa frið at framalað so góðar bilførarar sum vit til dagliga gerða so leingi vit hava frælsi og arbeiðsfrið til hettar.

Annars vil eg bert siga við Sjálvstýri, at tað er ikki handan vegin tit skulu fara, fyri at vinna bíligar ungdómsatkvøður.

Eitt kann eg vissa tykkum fyri, at koyrilærarar kunnu hvønn dag siga næmingunum, hvør flokkur er góður fyri ferðsluna.

*Kelda: www.ferdslan.net (við vón um at vit framyvir kunnu virka frælsir og sjálvstøðugir sum okkara »kollegar« í grannalondunum)*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.